# Væl vitjað varmakeldustevna

**Um vikuskiftið var varmakeldustevna í Fuglafirði. Skráin fyri stevnuna byrjaði longu mikudagin. Fyrireikararnir siga, at framsýningar og tiltøk fingu góða undirtøku**

VARMAKELDU-STEVNA
*Rúna Sivertsen*

Marjun Sigurðsdóttir setti stevnuna klokkan klokkan tvey seinnapartin leygardagin.

Í ár var FM-kappróður á varmakeldu, og tað setti sín serstaka dám á stevnuna.

Hópin av tiltøkum og framsýningum vóru á skránni. Á økinum frá Mentanarhúsinum og norður til Føroya Banka var tivoli, hoppiborgir og annað undirald.

Til stóra gleði fyri børnini, koyrdi eitt tok aftur og fram á økinum. Onkur vaksin nýtti eisini høvi at sleppa sær ein toktúr á "strøjnum" í Fuglafirði.

Leygarkvøldið var kvøldseta niðri við Mentanarhúsið, har stórt bál var kynt. Egon Øregaard flutti fram røðu og hugleiddi um barnadagarnar í Fuglafirði.

Felagssangur, føroyiskur dansur og fýrverk var eisini á skránni leygarkvøldð, og fólk hugnaðu sær rættiliga í góðveðrinum.



*Hesar elskuligu diddurnar eita Estir og Tove. Estir, sum ikki fyllir tvey fyrrenn í novembur, er fastir at 9 mánaðar gomlu Tove*



*Leygardagin stóðu menn á vegnum til Fuglafirðar og kravdu inn fyri kappróðurin. Tey, ið høvdu onnur ørindi í Fuglafirði leygardagin sluppu tó ókeypis til býin*




*Tiltøkini á varmakeldu vórðu væl vitjaði, siga vælnøgdir fyrireikarar*





*Børnini frøddust um tokið, sum koyrdi aftur og fram eftir vegnum millum mongu stevnugestirnar*



*Lítla Annie úr Norðragøtu var á stevnu saman við mammu og pápa*

# ítróttur

Nr. 126 • týsdagur • 8. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Brúðgommurin var rættuliga í hopla

**Heðin á Lakjuni skoraði tvey tey fyrstu B36 málini, og eftir at hann hevði misnýtt brotsspark, syrgdi hann fyri uppleggin-um til 3-0 málið**

FÓTBÓLTS BRÚÐGOMMUR
*Jóannes Hansen*

Tað var brúdleypshýrur í Gundadali sunnudagin. Ein av klaksvíkingunum í B36, Heðin á Lakjuni, hevði leygardagin givið sítt ja til Anna Mariu Sjóstein, sum eisini er ættað úr Klaksvík, og sum gongur í lærara-skúla í høvuðstaðnum.

Undir upphitingini rungaði brúðarmarsjurin úr hátalarunum, og Heðin á Lakjuni tóktist ikki plágaður av at vera giftur. Tá ið bara tólv minuttir vóru farnir, hevði hann tvær ferðir skorað, og báðu ferðirnar hevði hann sett høvdið undir bóltin.

Liðfelagarnir, sum høvdu verið í brúdleypinum á Viðareiði leygardagin vildu vera við til at krýna stóra fótbóltsdagin hjá liðfelaganum. Tá ið B36 fekk tillutað brotsspak, varð Heðin settur at skjóta, men hann misnýtti. Vit innaru síðuni á vinstra beini yvirplaseraði hann, og bólturin fór við síðuna av málinum.

Men Heðin hevði kortini stóran leiklut í 4-0 sigrinum hjá B36 á GÍ. Hann átti næstsíðsta fótin á, tá ið B36 økti til 3-0. Við neyvari sending legði hann bóltin fyri føturnar á Jákupi á Borg, sum skoraði til 3-0 og harvið avgjørdi, at øll stigini skuldu vera eftir í Gundadali.

B36 hevur ofta misnýtt brotsspørk seinnu árini. Hevur tú áður roynt teg úr ellivu metrum?

- Eg havi ongantíð skotið brotsspark í landskappingardysti áður. Hvørki í B36 ella í KÍ. Eg havi skotið í brotssparkskappingum, men ikki í sovornum dysti. Tað var heldur ikki avtalað hesa ferð, at eg skuldi skjóta, men liðfelagarnir vildu hava, at eg skuldi royna, og so gjørdi eg tað. Men eg rokni ikki við, at eg fari at verða biðin aftur næstu ferð!

## Fótbólturin krevur nógv

Í góðveðrinum leygardagin vóru knappliga hálvt triðja hundrað fólk í brúdleypi á Viðareiði. Millum hesi vóru nógvir fótbóltsspælarar, bæði úr KÍ og B36. Skipað var so fyri, at Dúgvan var leigað at sigla eykatúr av Klaksvík um midnáttina, men tá vóru spælararnir á oddaliðnum longu farnir. Ion Geolgau hevði givið ordrar um, at B36 spælararnir skuldu fara úr Klaksvík klokkan eit korter til ellivu, tá síðsti túrurin eftir vanligu ferðaætlanini var úr Klaksvík.



*Heðin á Lakjuni bleiv giftur leygardagin undan dystinum móti GÍ, og hann var veruliga í fokus. Tvey mál, eitt brent brotsspark og eitt upplegg til mál var undirhaldið frá Heðini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í annaðkvøld skulu Heðin á Lakjuni og liðfelagarnir verja oddasessin ímóti VB í Gundadali. So verða nakrir frídagar á skránni. Men tað verður skjótt aftur fótbóltur í gerandisdegnum hjá B36 spælarunum. Teir skulu undir fyrireikingarnar til steypafinaluna. Ólavsøkudag skulu teir aftur spæla ímóti GÍ um, hvat av hesum báðum liðunum skal eiga Løgmanssteypið næsta árið. Og hóast B36 vann sannførandi sunnudagin, so verður einki slakað í fyrireikingunum.

Anna Maria og Heðin á Lakjuni fara hósdagin á brúðarferð. Tey fara suður í heitari lond at slappa aví nakrar dagar.

- Vit høvdu ætlað at verið tvær vikur sunnanfyri, men tað er ein spurningur, um tað ber til, nú vit skulu fyrireika okkum til steypafinaluna á ólavsøku, sigur Heðin á Lakjuni, sum gleðir seg - um at hava fingið konu, um frítíðina og til at spæla finalu á ólavsøku.

VB - AB 3-1 (0-1):

## AB snávaði í odda-strínum

**AB hevði stóra yvirvág fyri steðgin, men megnaði bert at fáa tað eina málið. VB kom sterkt aftur í seinna hálvleiki og vann at enda greiðan sigur**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

AB misti eitt stórt fet í oddastríðnum, tá argjamenn snávaðu í Vági. AB-arar dylja ikki fyri, at liðið vil spæla um uppflyting í hesum árinum, men langt er nú upp til ÍF á fyrsta plássi. VB fór við teimum trimum stigunum og fór eisini framvið AB í stigatalvuni.

Tað var annars AB, sum hevði tamarhald á støðuni fyri steðgin. Liðið skapti fleiri góðar málmøguleikar, men útiliðið megnaði ongantíð at gera sær veruliga dælt av einum illa leikandi VB-liði.

Pætur Dam Jacobsen legði annars AB framum í fyrra hálvleiki. Hann fekk bóltin á egnari hálvu og setti síðani ferð á og rak alla VB-verjuna av, áðrenn hann sendi bóltin framvið málverjanum.

AB hevði tveir aðrar sera stórar málmøguleikar fyri steðgin. Jan Jørgensen skallaði á yvirleggjaran, og Bogi Midjord gjørdist ta einu ferðina púra leysur á málteiginum, men AB hevði hvørki hepni ella hegni til at gera sær dælt av hesum báðum málmøguleikunum.

### VB hamskift

Tað var eitt heilt annað VB-lið, sum kom á vøllin eftir steðgin, meðan AB var heilt fyri ongum. Jón Gærdbo javnaði einar tíggju minuttir inn í seinna hálvleik, tá hann setir fótin á eitt innlegg úr høgru.

VB legði nú trýst á AB-málið, og tað gav eisini bonus nakað seinni. Bergur Vinther gjørdist leysur við málverjanum, men valdi heldur at spæla ein púra leysan Elian Hansen, sum lættliga kundi leggja VB framum 2-1.

Niklas Ludvig skoraði seinasta málið við einum frísparki. Bólturin bar við verjugarðin og snýtti soleiðis málverjan.

VB fór við sigrinum tvey pláss uppeftir stigatalvuni, og næstbesta liðið hjá vágbingum liggur nú á triðja plássi beint frammanfyri TB. AB datt hinvegin heilt aftur á fimta pláss, og tað munnu argjamenn ikki vera serliga nøgdir við.

**VB-AB 3-1 (0-1)**

0-1: Pætur Dam Jacobsen
1-1: Jón Gærdbo
2-1: Elian Hansen
3-1: Niklas Ludvig